# Eyka bygdarráðsfundur - stytt gerðabók

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 11.06.2019 kl. 17.00

Á fundi: Janus Thomsen
Eir J. Norðberg
Magni Bertholdsen
Gunnhild Mortensen
Rúni Thomsen
Sten Spange Larsen
Poul Laust Christiansen (fyri Niels Olaf Eyvindsson)

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

1. **Ársroknskapur 2018 til góðkenningar.**
   Ársroknskapur hjá Hvalbiar Sóknar Kommunu fyri 2018 til góðkenningar. Inntøkurnar frá kommunuskatti og øðrum inntøkum eru tkr. 30.774, rakstrarútreiðslur tkr. 25.530, rentustuðul/rentuútreiðslur tkr. 405 og løguútreiðslur tkr. 2.873 - ella íalt tkr. 28.808. Roknskapurin gevur eitt avlop á tkr. 1.966.

| | **Rakstur:** | | **Løgur:** | |
|---|---|---|---|---|
| §1. Kommunal fyrisiting | tkr. | 2.243 | tkr. | 0 |
| §2. Almanna- og heilsumál | tkr. | 10.221 | tkr. | 0 |
| §3. Børn og ung | tkr. | 4.822 | tkr. | 619 |
| §4. Undirvísing | tkr. | 2.362 | tkr. | 595 |
| §5. Mentan og frítíð | tkr. | 1.329 | tkr. | 236 |
| §6. Teknisk mál | tkr. | 2.207 | tkr. | 804 |
| §7. Kommunal virki | tkr. | 2.346 | tkr. | 619 |
| | **tkr.** | **25.530** | **tkr.** | **2.873** |

Skattainntøkur vegna eldraøkið eru tkr. 7.698. Rakstrarútreiðslurnar til eldrasamstarvið eru tkr. 8.195 – leiguinntøka av sambýlinum er tkr. 362.

**Fíggjarnevndin 11.06.2019:**
Nevndin hevur gjøgnumgingið roknskapin og mælir bygdarráðnum til at góðkenna hann.

**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at góðkenna roknskapin fyri 2018.

2. **Sáttmáli við P/F Bakkafrost.**
Fyribils leigusáttmáli millum Hvalbiar Kommunu og P/F Bakkafrost Farming um leigu av einum øki til víddar umleið 2.800 m2, sambært hjálagda korti. Leigugjaldið er kr. 30,00 pr. m2.
**Vega- og havnanevnd 13.05.2019:**
Nevndin hevur umrøtt fyribils sáttmálan og mælir bygdarráðnum at taka undir við hesum.
**Fíggjarnevndin 11.06.2019:**
Einmælt samtykt at mæla til at góðtaka fyribils sáttmálan.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

3. **Fíggjarætlan Bú- og Heimatænastan Suðuroy 2019:**
Til viðgerðar uppskot um fíggjarætlan 2019 fyri Bú- og Heimatænastuna, hetta er uttan royndarætlan fyri eldraøkið. Samlaða fíggjarætlanin er á kr. 55.087.000 – parturin hjá Hvalbiar Kommunu er sambært hesum uppskoti kr. 7.878.098. Framrokningin fyri afturbering frá landinum, bygd á 3 mánaðir, gevur kommununi kr. 8.131.414.
**Fíggjarnevndin 11.06.2019:**
Nevndin mælir til at taka undir við fíggjarætlanini, treytað av, at allar kommunurnar í samstarvinum fáa loyvi at lata alla afturberingina frá landinum fara í samstarvið.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá nevndini.

4. **Ikki almenn mál:**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 18.30

Janus Thomsen Eir J. Norðberg Magni Bertholdsen Rúni Thomsen

Gunnhild Mortensen Sten Spange Larsen Poul Laust Christiansen